# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Miðlahúsið í Norðoyggjum

Í dag er stórur dagur fyri okkum í Miðlahúsinum. Vit vóna og rokna við, at hetta eisini er stórur dagur í Klaksvík og Norðoyggjum. Eftir at vit leingi hava hugsað um og lagt ætlanir, sum fleiri ferðir eru vendar, snaraðar, revideraðar og broyttar, seta vit í dag skjøtil á nýtt tíðarskeið.

Vit hava móttøku í studionum, sum vit fyri stuttum keyptu frá Pegasus. Tá ið vit fingu tann møguleikan, vóru vit ikki í iva um, at tað var rætt at keypa. Vit hava leingi verið sannførd um, at tað er rætt at seta meiri orku inn í norðara og eystara parti av landinum. Her verður hugsað um Klaksvík og Norðoyggjar, og her verður hugsað um Eysturoy, og í hesum førinum serliga eystara partin av oynni, men eisini Skálafjørðin.

Hetta økið hevur veldugar vakstrarmøguleikar og menningarmøguleikar. Síðani Norðoyatunnilin opnaði fyri skjótt hálvum øðrum ári síðani, eru fleiri ítøkiligar ætlanir um samstarv og samanlegging vornar til veruleika. Eitt nú á vinnuøkinum og á mentanarøkinum. Miðlahúsið vil fegið fylgja við í hesum økinum. Tað hava vit roynt at gera í Sosialinum, eitt nú við at hava skrivstovu í Klaksvík og við regluligum vitjanum í økinum. Nú vilja vit fegin spenna okkum meiri út.

Í Miðlahúsinum í Vágsbotni eru vit júst nú farin undir nýtt konsept. Blaðið og netið hava fingið útvarp afturat sær. Møguleikar eru fyri fleiri miðlum, møguleiki er fyri at senda alla staðni frá, og møguleiki er at senda alla tíðina.

Tað er í hesum sambandinum – við blaðnum, netinum og útvarpinum – at vit nú bjóða okkum fram í Norðoyggjum. Vit kenna hetta sum spennandi avbjóðing, og hóast vit í fyrstu atløgu leggja eitt sindur varliga fyri, so rokna vit við, at sendingar í og úr Norðoyggjum skjótt fara at gerast ein týdningarmikil partur í útvarapsskránni. hjá Rás2.

Í eini miðlafyritøku er fyrsta fyritreytin fyri, at tað skal ganga, at tú hevur fólk, sum er virkið og skúlað, og sum hevur hug og áræði at fáast við hetta slagið av arbeiði, og sum hevur fingurin á pulsinum í økinum, sum tað verður arbeitt í.

Fleiri av okkara fremstu journalistum hava havt og hava røtur í hesum økinum. Vit hava væl skúlað og roynt fólk her norðuri, og vit vóna, at tað fer at bera til at klekja nýggj journalistisk evni her á leið, nú nýggjar avbjóðingar standa fyri framman.

Vit bjóða øllum at vera væl komnum til móttøku í Klaksvík í dag, og vit síggja fram til góða samstarvið og stóru menningina, sum vit heilt víst vænta stendur fyri framman, nú Miðlahúsið er vorðið partur av Norðoyggjum, og Norðoyggjar eru vornar partur av Miðlahúsinum. Hetta er ein stórur dagur fyri okkum, og hetta er vónandi eisini ein stórur dagur fyri klaksvíkingar og norðoyingar.

**Sosialurin**

## Skálafjarðartunnilin

ÓLI MIKKELSEN

lækni

**Undirritaði hoyrdi meginpartin av orðaskiftinum á tingi um Skálafjarðartunnilin. Eg loyvi mær at tríva í okkurt av tí, sum treingir til viðmerking**

**Rundkoyringin**
Allir tinglimir tyktust vera samdir um at trunka ferðsluna saman í ein undirsjóvartunnil við rundkoyring undir havbotninum. - Tað er skeivt.

Ferðslan, sum »bara« skal um Skálafjørðin, eigur at haldast leys av høvuðsferðsluni, sum verður tann tættasta í landinum, sjálvt um ferðslan um Skálafjørðin ikki verður blandað uppí.

At landsverk varð niðurgjørt fyri at hava eina meining um ætlaða rundkoyring, var ósømiligt.

**- Einki lært!**
Ein tinglimur nevndi møguleikan at lata høvuðsferðsluna fara omanfyri húsini í Runavík. - Hann fekk harða átalu. Tingini skuldu ikki blandast saman, tí her var talan um undirsjóvartunnil.

Er meiningin at fáa størri ruðuleika enn í Leirvík!

Umhugsast má gjølla, hvussu best er at koma til/frá tunnilsmunnanum báðu megin.

Eg havi áður víst á, at nógvir fyrimunir eru við at høvuðstunnilin er millum Hvítanes og Rituvíksháls.

Ti dømis er dýpið á Tangafirði minst her. Harvið verður hallið í tunlinum munandi minni, enn við ætlaða tunli av Sundi og ferðslan verður leys av bygdum øki, um vegur verður gjørdur omanfyri húsini í Runavík.



**Ískoyti - Flogvøllur**
Samskipan eigur at vera, so mest nytta fæst úr tunnilsgrótinum - til dømis nýggj flogbreyt.

Flogmálið er komið upp í rulk, tí politikarar ikki vita - ella vilja vita - hvat teir tosa um.

Málið verður millum alternativan flogvøll til tann í Vágum og EINA nýggja floghavn.

Í Søltuvík eru umstøðurnar at kalla tær somu sum í Vágunum, so kanningarnar har eru at spilla tíð og pengar burtur.

Kirkjubønes og Skorhæddin/Eystnes eiga at kannast samstundis, so samanberast kann.

Skorhæddin var í 1963 kanningini mett best egnað til flogvøll, millum annð - tí har er rættuliga javnur vindur. Og møguleiki fyri tvørbreyt. Eisini fæst long breyt - 3-4000 metrar - eftir røðini móti Eystnesi. Her eru stórmál at taka støðu til - mál, sum hava avgerandi týdning fyri, um Føroyar klára seg í framtíðini.

## Til Tjóðveldi

GYÐJA JOHANNESEN
MIRIAM NOLSØE JOHANNESEN

Til lukku við nýggja samleikanum! Ein spurning: Hví hava tit gjørt av at eita Tjóðveldi heldur enn Tjóðveldið? Hví óbundið heldur enn bundið? Vil tað so siga, at tit fara at siga: “Vit í Tjóðveldi halda at...” heldur enn: “Vit í Tjóðveldinum halda at...”.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.